## Havisjúka

Ein vandrianekdota í umsetara-cirklum er tann um dramavinin, sum skuldi umseta ein sjónleik úr donskum í føroyskt: Hann umsetti 'havesyge' til 'urtagarðssótt'.

Sama ger, um verulig grund er undir hesari søguni. Nógvar aðrar frásagnir eru um, hvussu trekt og torført tað mangan gongur at flyta tankar yvir í føroyskt. Nú ein dagin kom ein tingmaður við tí pástandi, at tann, sum "hevði brotið seg", skuldi straffast. Tað hoyrdist á málinum hjá honum, at hann ætlaði at siga "forbrotið seg", men so steig tann innari censorurin á slanguna, og bara helvtin av orðinum kom út. Og í Sosialinum um dagarnar bleiv sagt um onkran faðirloysing, at hann bara tólv ára gamal var blivin "húsmaður". Meiningin hevur nokk verið forsyrgjari. Veit nakar, hvat ein húsmaður er? Danskarar hava husmand og husven, og føroyingar kundu fyrr hava eitt húskors, og onkur kemst helst við orðið húsbøðil, sum er nakað heilt annað enn eitt húsvætti.

Tað kemur fyri, at Máltænastan fær klagur um undarligar ella vánaligar umsetingar. Ein umsetari hevði umsett fyri eitt firma í USA. Hann umsetti 'logical monitor' til 'logiskur vísari'. Hetta bleiv av einum "málkønum" rættað til "skilvísur vísi". Í einum øðrum teksti bleiv 'medarbeiðarar' strikað og erstattað við 'starvsfólk'. Men her er okkurt rúkandi galið: skulu øll orð, sum beginna við med- vera óføroysk? Skulu vit so eingi medmenniskjur hava longur, og skulu hesir medskapningar ikki sleppa at hava sína serligu medferð? Paris verður "rættað" til París, og Rom, tann ævigi staður, verður nú av útvarpinum eyknevndur Róm [røvm], tí tey halda tann íslendska stavimátan vera "føroyskari" enn tann normala. Forstandi tað hvør, ið kann. Hví skulu tey, sum hava eitt ónatúrligt forhold til málið, hava rættin til at hava málið? (MT)

### Sosialurin fyri 25 árum síðani:

# Framvegis eingin leigusáttmáli um herstøðina í Mjørkadali

»Bygningarnir hjá NATO-støðini í Mjørkadali og á Sornfelli hava enn ikki fingið nakað matrikkulnummar, og tað er ikki líkt til, at nakað ítøkiligt er gjørt fyri at broyta ein matrikuldóm sum sigur, at har finst einki leigumál. Men umboð frá kamaradvokatinum hava verið í Føroyum«. Soleiðis skrivaði Sosialurin tann 22. mai í 1984



tíðindablaðið

sosialurin

nr. 60 • týsdagur 22. mai 1984 57. árg.

Norröna givið stórt undirskot:

**Nógv farið av landskassa-veðhaldinum**

Á síðu 5

**Havnar Bridge-felag vann FM**

Baksíðan

**Framvegis einki lógligt leigumál um lendið hjá NATO**

Umboð fyri Kammeradvokaten og Forsvarets Bygningstjeneste hava verið í Føroyum. Teir hava tosað við Matrikulstovuna, men ikki við eigaran av lendinum, Føroya Jarðarráð, ella við bóndan.

Á síðu 5

**Ítróttur inni í blaðnum**

Frá kappingunum seinasta vikuskifti

## 1984



Eirikur Lindenskov
blaðmaður
eirikur@sosialurin.fo

22. mai 1984: Fyri stuttum frættist, at umboð fyri Kammer-avokaten og umboð fyri For-svarets Bygningtjeneste vóru í Føroyum fyri at fáa greiði á brúksviðurskiftunum til jørðina, har bygningarnir hjá Nato-hervald-inum standa.

Tá løgtingsmenn og tíðindafólk vitjaðu í Mjørkadali fyri stuttum, váttaði ovastin, M. Johnsen, obertløjtnantur, at menn høvdu verið í Føroyum, og at teir hvødu havt samráðingar við føroyskar myndugleikar fyri at fáa greiði á spurninginum.

Stjórin á Matrikulstovuni, Olávus Danielsen, upplýsir, at umboði fyri kamaradvokatin og Forsvarets Bygningstjeneste vóru á Matrikulstovuni, tá teir vóru í Føroyum.

Umboðini vildu hava at vita, hví leigusáttmálin um jørðina ikki er skrásettur, men Matrikkulstovan kundi bert svara, at tað var hann ikki, tí dómur er sagdur í málinum.

Olávus Danielsen sigur, at at lendið, har bygningarnir standa, er ikki serskilt skrásett, tá Sund varð matrikkuleráð, og tí er leigusáttmálin millum Forsvarets Bygningstjeneste og Jarðarráðið og bóndan í Kaldbaksfirði, Petur Bærentsen, ikki komin í tingbókina.

### Ikki hjá eigara ella festara

Sum Sosialurin hevur skilt málið, kann matrikkuldómurin broytast, um Føroya Jarðarráð og festarin góðtaka leigusáttmálan ella tað at hann verður skrásettur.

Um so er, kann Jarðarráðið venda sær til Matrikkulstovuna fyri at fáa lendið skrásett, og so má Matrikkulstovan geva lendinum matrikkulnummar og fáa formalitetirnar í rættlag.

Men líkt er ikki til, at umboðini fyri kamaradvokatin ella byggitænstuna hjá donsku verjuni hava vent sær til Føroya Jarðarráð. Formaðurin í Jarðarráðnum, Christian R. Joensen, sigur, at hann er ikki vitandi um, at nakar heur vent sær til Jarðarráðið í hesum sambandi.

Á skrivstovuni hjá Føroya Jarðarráð bar heldur ikki til at fáa nakað at vita. Skrivarin hjá Jarðarráðnum, Jóannes Dalsgarð, var ikki at hitta í gjár.

Og hvørki Forsvarets Bygnings-tjeneste ella Kammeradvokaten hava vent sær til bóndan, Petur Bærentsen. Hann sigur, at hann einki hevur hoyrt um málið.

Um umboðini fyri Kammeradvokaten og Forsvarets Bygningstjeneste hava havt samráðingar við landsstýrið um spurningin, hevur ikki eydnast Sosialinum at fáa at vita.

### Einki mótmæli

Upprunaligi leigusáttmálin millum Forsvarets Bygningstjeneste og Føroya Jarðarráð og festara er frá 1963. Sambært sáttmálanum kann Jarðarráðið ella bóndin ikki siga hann upp at fara úr gildi.

Tá matrikkuleringin av Sundi fór fram, var leigumálið ikki tikið við. Sum sáttmálin er formaður, skuldi hann havt verið tikin við. Og tá matrikkuleringin varð løgd fram alment, mótmælti eingin, og tí fall matrikkuldómur uttan leigumálið hjá hervaldinum.

*jo-mo*